## Svimja um Sundalagið

Leygardagin 31 okt kl 10.00 skipa einstaklingar og Hósvíkar Róðrarfelag fyri svimjing av Selatrað til Hósvíkar. Hetta er fyrstu ferð hetta er roynt alment, men hava nakrir svimjarar svomið har á leiðini nakrar ferðir, fyri at kanna og kunna seg við viðurskiftini. Ætlanir er, at hendan svimjing saman við Nólsoyar- sjómannadags- og jóansøkusvimjingin skulu vera fastir tættir í havsvimjingini. Hugsað hevur eisini um Skálafjørðin, og tí verður leitað eftir fólki, sum kunnu fyriskipa tiltakinum. Til ber at skifta í róðrarneystinum frá kl 9.00, og kl 9.45 verða allir svimjararnir sigldir yvir á Selatrað. Meðan svomið verður eru bátar at ansa svimjarunum, og tryggja, at teir koma trygt vegin fram. Teinurin er einar 2,4 km langur.



## Laudrup upp á tal í Villareal

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup verður nú settur í samband við spanska felagið Villareal. Úrslitini hjá Villareal hava verið vánalig higartil í ár, og trýst hevur verið á venjaran Ernesto Valverdo. Í gjárkvøldið vann Villareal tó, og tað hevur helst venjaranum nakað av luft. Sponsk bløð halda, at Michael Laudrup verður boðsendur, um Villareal skal skifta venjara.

### StÍF – Neistin 15-32 (8-14):

# Klassamunur á Skála



Neistin hevði ongar sum helst trupulleikar við at vinda burtur úr StÍF sunnudagin

Mynd: Álvur Haraldsen

**Tað var lítið óvæntað í greiða sigrinum hjá Neistanum á Skála í gjár. Kravið var tvey stig, og høvuðsstaðarfelagið eltir tískil oddaliðini**




Uni Holm Johannesen

Uppgávan hjá StÍF seinastu árini hevur verið at arga oddaliðini, ið kapprenna um meistaraheitið. Tað hevur eydnaðst onkutíð, men veturin 2009 sær út til at gerast sera tungur fyri kvinnurnar av Skála. Tað varð aftur prógvað í gjár. Tað var eingin vanlukka at tapa móti Neistanum á heimavølli. Men at tapa við heili 17 málum er ikki nøktandi.

### Runnu undan

Neistin hevði tamarhald á støðuni alt fyri eitt. Tær vunnu sær eina trygga leiðslu miðskeiðs í fyrra hálvleiki, og munurin var seks mál í steðginum. Eftir hvíldina royndi heimaliðið at stríða seg aftur í dystin, men tær nærkaðust ongantíð teimum bláu. Seinastu løtuna eydnaðist alt hjá gestunum, sum staðfestu sigurin so dyggiliga.

Fleiri av yngru leikarunum fingu álit frá venjaranum, Daniel Rapa. Hann kundi frøast um, at fleiri royndust væl sum málskjúttar. Katrin á Neystabø, Unnur Danielsen og Marjun F. Danberg vóru bestar við fimm málum hvør.

### Í trupulleikum

StÍF hevur lagt sera illa frá landi. Fyrstu tríggir dystirnir hava einki stig givið, og málmunurin er longu -37. Tað eru ábendingar um, at tær fáa tað sera trupult komandi mánaðirnar. Tað er serliga VÍF og VB, sum tær skulu royna at leggja aftur um seg á stigtalvuni. Hesir innanhýsis dystirnir verða alt avgerandi, tí munurin á oddinum og botninum í bestu føroysku kvinnudeildini í gjár tykist sera stórur. Sunnudagin vitja gullvinnararnir úr Tjaldinum á Skála.

Neistin hevur seks stig fyri fýra dystir. Stigini eru vunnin móti VB, VÍF og StÍF, sum er niðaru liðini á stigatalvuni. Høvuðsstaðarfelagið dumpaði, tá Stjørnan vitjaði í høllini á Hálsi fyri trimum vikum síðan. Tí kann Neistin framvegis ikki av álvara styrkismetast. Men tær renna aftaná oddinum í løtuni.

### FAKTA

**StÍF-Neistin 15-32 (8-14**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 5-11
**40 min:** 9-20
**50 min:** 13-24
**Málskjúttar**
**StÍF:** Bobra Adriana 5(1), Rebekka Justinussen 4, Annika L. Petersen 2, Fríðrunn Danielsen 1, Bára Berthelsen 1, Anna Petersen 1, Asgerð Káradóttir 1
**Neistin:** Katrin á Neystabø 5, Unnur Danielsen 5, Marjun F. Danberg 5(1), Jacklin Durhuus 4, Bára Danielsen 3, Birita Wardum 3, Rakul Augustinussen 3, Lina Andriulyte 2, Anja Heinadóttir 2
**Brotskøst:** StÍF 2, Neistin 2
**Útvísingar:** StÍF 2, Neistin 2
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

### VÍF-H71 22-24 (10-11):

# Glógvaði í meistarunum

**H71 vann triða sigurin á rað, tá teir sunnudagin fóru úr Vestmanna við øllum stigunum**




Jákup Mørk

Eftir eina heldur trilvandi byrjan eru meistaranir úr Hoyvík veruliga við at koma fyri seg.

Sunnudagin vunnu teir sín triðja sigur á rað, og avrikið í Vestmanna ber sjónliga boð um, at teir væl og virðiliga kunnu røkka somu hæddum í ár.

Í Vestmanna byrjaðu teir alt fyri eitt at bíta frá sær. Poul Kjartan Dam hevur skotið frá hond fyrstu dystirnar í ár, og hann gjørdi einki undantak í so máta hesaferð.

Eina løtu var eisini líkt til, at H71 veruliga skuldi renna avstað, men VÍF raknðaið við undan steðginum, soleiðis at tað mest sum stóð á jøvnum, tá farið varð inn til hálvleiks.

Eftir steðgin setti H71 seg tó aftur á tað mesta. Munurin tóktist bara at veksa, og tá 10 minuttir vóru eftir at spæla, tóktist sigurin vera mest sum heima.

Mamsverja langt úti á vøllinum og fimm mál á rað frá VÍF vóru tó um reppið at koppa øllum á høvdið, men aftur fingu gestirnir seinastu orðið. Teir megnaðu at halda høvdinum ísakalt, tá mest stóð á, og so eru teir framvegis væl og virðiliga við í feltinum, sum eltir finaluplass.

Tað eru vestmenningar eisini, men munurin upp til oddasessin er nú øktr upp í fýra stig fyri teirra viðkomandi.

### FAKTA

**VÍF-H71 22-24 (10-11)**
10 min: 5-6
20 min: 7-9
40 min: 12-16
50 min: 16-22
Málskjúttar
VÍF: Sámal Joensen 5(2), Sámal J. Djurhuus 4, Jákup S. Andreasen 3, Magnus Müller 2(2), Bjarti Hansen 2, Regin Joensen 2, Sjúrður Poulsen 2, Magnus á Rógvi 2
H71: Poul Kjartan Dam 9(2), Bárður Brimvík 5, Rógvi Sørensen 4, Janus Sørensen 3, Rúni Højgaard 1, Tróndur Vatnhamar 1, Dánjal Tórgarð 1
Brotskøst: VÍF 5, H71 3
Útvísingar: VÍF 2, H71 5
Dómarar: Hans Thomassen & Hanus Kurberg